# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Bretland – portrið til víðari heimin

Okkara granni fyri sunnan við sínum 60 milliónum íbúgvum bjóðar nógvar møguleikar fyri føroyingar og føroyska vinnu. Søguliga sæð hava føroyingar gjøgnum fiskivinnuna havt gott samband við Stóra Bretland, men í nógv ár hevur handils- og útbúgvingarsambandið hjá føroyingum við útheimin verið ógvuliga eittbeint.

Seinnu árini hava tó verið glottar at hómað. Alsamt fleiri føroyingar eru farnir til Bretlands at fáa sær útbúgving. Hetta er blivið enn lættari, eftir at føroysk lesandi nú í parti av Bretlandi gjalda sama gjald sum EU lesandi, har vit frammaundan vóru flokkað sum "overseas".

Seinastu árini hevur alt ov nógv verið kopierað úr Danmark, uttan at man hevur hugt at alternativum loysnum. Hetta ger seg galdandi bæði innan tað almenna og tað privata. Hygg at forbrúksvørunum á føroysku handilshillunum. at almenna bygnaðinum, at skatta- og avgjaldsmynstri.

Tað er náttúrligt, at tað samfelag, har fólk taka sína útbúgving smittar av her heima, tá hesi koma aftur, og tí er umráðandi við spjaðing, so tað besta kann vera tikið frá øllum londum.

Útyvir hækkaða talið av lesandi, er eisini ein dupultskattavtala undirskrivað við Bretland, ið ger tað lættari hjá virkjum og einstaklingum at virka og arbeiða í Bretlandi. Hetta er eitt framstig, ið hevur verið bíðað eftir. London er heimsins fíggjarhøvuðsstaður, og tí er tað sjálvsagt, at føroysku myndugleikarnir gera tað lættari hjá føroyingum at vinna og virka í Bretlandi.

Ferðasambandið er batnað munandi við at ferjuleið til Skotlands er uppafturtikin. Tað var ein feilur nakrantíð at niðurleggja hesa leið, og tað er gleiðiligt, at rutan er uppafturtikin. Hetta ger góðan mun saman við menningini í flogferðsluni til Bretlands hjá Atlantsflog.

Tá nú samband og møguleikar eru betrað, er tað umráðandi, at almennu Føroyar signalera, at man ikki favoriserar lesandi og einstaklingar, ið fara til Danmarkar. Hesi eiga at vera síðustillað við onnur lond. Í hesum sambandi eiga almennu Føroyar at hyggja at lønarsáttmálunum innan tað almenna, har man favoriserar minni intensivar útbugvingarskipanir, sum t.d. ta donsku, við at brúka normeraða tíð til lønaráseting. Hetta er burturvið, eftirsum stórur munur kann vera á pensumi, tímatali og feruiári. Hetta eigur at vera rættað skjótast, um man ynskir eina kosmopolittiska arbeiðsmegi. Eisini má Fíggjarmálaráðið avtaka tær eftirverandi forðingarnar hjá fólki, sum t.d. gera, at tað eru størri restriktiónir á, hvat man kann fáa við sær heim aftur sum flytigóðs, um man kemur úr Bretlandi enn úr Danmark. Hetta er eitt smáting, men tað hevur sera stórt signalvirði.

Bretland er eitt portur til víðari heimin, sum vit gera klókt í at nýta til fulnar.

**Sosialurin**

## Tað at binda Føroyar saman er fremsta politiska málið beint nú – tí sandoyartunnil



**BIRGIR MOHR**
Sandi

Hvussu kann ein landsstýrismaður – um enn nakað politiskt feskur – siga, at einki argument er fyri at gera ein sandoyartunnil nú ??? Sær ein búskaparfrøðingur ikki, at menningin í/av Føroyum er brotin av um Skopunarfjørð?

Útviklingur og menning – og búskaparlig upphiting fer fram norðan fyri Skopunarfjørð við miklari ferð, meðan Sandoyggin og Suðuroyggin leingi hava staðið í stað og eru sigldar afturút, tí fyritreytirnar eru í og um Tórshavn.

Tað er alneyðugt at fáa bæði Sandoynna, síðan Suðuroynna og upp á longri sikt eisini tær minnu oyggjarnar samanbundnar við tunlum. Tað er ov kostnaðarmikið at sigla millum oyggjarnar, og heldur ikki nøktandi farvegur í framtíðini.

Hetta er størsta fyritreytin fyri framburði og vælstandi í øllum Føroyum. Vælferð er ikki at flyta okkum øll til Tórshavnar, men Tórshavn er høvuðsstaður okkara og miðstøða Føroya fólk. Og tað eigur Havnin at liva upp til.

Tað var tann tíð, tá bygdirnar og oyggjarnar føddu Havnina. Men í dag kemur allur peningur úr Tórshavn, og har fellur mest niður fyrst.

Og verða Føroyar eitt valdømi, so fáa vit uppaftur meira miðstaðarlokalpolitikk, tað prógvar júst hendan umrøðan um raðfesting av íløgum fyri okkum.

Í skjótt fýra ár hevur staðið í samgonguskjalinum hjá Føroya landsstýri, at í ár 2007 skal verkslógin fyri sandoyartunnilin viðtakast – fyri at byrja verkið í ár 2008. Forkanningar eru gjørdar.

Hetta eigur at liggja fast, um nakað álit skal vera á politiska lívið í Føroyum frameftir, og ein nýggjur landsstýrismaður kann ikki einsamallur broyta hetta.

Sandoyartunnilin er alneyðugur nú.

# Liggjandi góðveður

*- Góða veðrið heldur sær, lovar Petur Skeel*



**- Tað verður gott veður um vikuskiftið, lovar veðurmaðurin Petur Skeel Jacobsen**

**VEÐUR**
*Snorri Brend*

Hann hevur í morgun lisið veðurkortini, og eftir hesum kann hann bara staðfesta gleðiligu tíðindini til alt Føroya fólk.

Í morgin og sunnudagin verður turrveður og sól. Møguleiki er kortini fyri onkrum einstøkum æli leygardagin, men tað hoyrir til undantøkini.

- Tað verður eisini lítil vindur og góður hiti – millum 12 og 17 stig, sigur Petur.

Fyrstu dagarnar av komandi viku verður hann upp í strúk av vindi av norðuri, okkurt ælið, men framvegis sami hitin.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.